Ár 2010, hin 15. juni

80.
10/00207 Sjálvsognarstovnurin Spinnaríið – stovning, viðtøkur v.m.

Arbeitt hevur verið við uppskoti til reglugerð fyri mentanarhúsið Spinnaríið. Uppskotið hevur verið til við-merkingar hjá limunum í nevndini fyri Spinnaríið, og hava teir ongar viðmerkingar. Tí mælir umsitingin í skrivi, dagfest 31. mai 2010, til at samtykkja uppskotið til reglugerð.

Á fundi 2. juni 2010 tekur Mentanarnevndin undir við tilmælinum frá umsitingini.

Á fundi 9. juni 2010 biður Fíggjarnevndin umsitingina tillaga fyriliggjandi uppskot til býráðsfundin.

Býráðsins samtykt: Tilmælið frá umsitingini, dagfest 15. juni 2010, samtykt.

81.
09/00942 Bygdarætlan fyri Svínoy – býarplansbólkurin.

Býráðið samtykti á fundi 24. mars 2009 at seta í verk endurskoðanararbeiðið við býarplaninum, sum millum annað umfatar eina bygdarætlan fyri Svínoy. Býarskipanarbólkurin hevur saman við Svínoyarnevndini útarbeitt eitt uppskot, ið nevndir býráðsins hava fingið til viðgerðar. Sí annars skriv og korttilfar í málinum, dagfest 28. mai 2010.

Á fundi 31. mai 2010 hevur Heilsu- og Umhvørvisnevndin ongar viðmerkingar og tekur undir við ætlanini.

Á fundi 1. juni 2010 tekur Ferðslunevndin undir við ætlanini.

Á fundi 1. juni 2010 tekur Havna- og Vinnunevndin undir við uppskotinum.

Á fundi 1. juni 2010 tekur Tekniska Nevnd undir við uppskotinum

Á fundi 2. juni 2010 tekur Mentanarnevndin undir við upp-skotinum

Á fundi 2. juni 2010 tekur Sosiala Nevnd undir við upp-skotinum

Á fundi 9. juni 2010 tekur Fíggjarnevndin undir við Heilsu- og Umhvørvisnevndini, Ferðslunevndini, Havna- og Vinnu-nevndini Teknisku Nevnd, Mentanarnevndini og Sosialu Nevnd.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt.

82.
10/00427 Øki til lítla Trølla-Pætur húsið – Sp/f Trølla Pætur.

Sp/f Trølla Pætur hevur vent sær til kommununa um at fáa eitt øki til eitt lítið hús á uml. 25 m^2. Søkt verður um eitt øki á Akursmørk. Sí annars skriv, dagfest 12. mai 2010.
Akursmørk er í byggisamtyktini útløgd sum D9 við áseting um park- og náttúruøki og fríøki. Verandi áseting heimilar sostatt ikki nakrari bygging á hesum økinum. Ferðslutrygdarliga liggur økið í umhvørvi við høvuðsferðsluæðr til tríggjar síður og øllum parkeringsmøguleikum hinumegin ferðslutyngdar vegir. Sannlíkt er eisini, at nógvur

peningur má setast av til undirlendið, áðrenn ein slík ætlan kann fremjast á økinum. Umsitingin skjýtur tí upp aðra tíðaravmarkaða staðseting. Sí skriv frá umsitingini, dagfest 27. mai 2010.

Á fundi 1. juni 2010 mælir Tekniska Nevnd til at vísa til øki A ella B á viðlagda korti. Kommunan ber ongar útreiðslur av hesi verkætlan. Nevndin mælir eisini til, at stuttfreistaður sáttmáli verður gjørdur, og at húsið skal kunna flytast av økinum eftir 30 døgum, tá kommunan ynskir tað og á egi økið í tráð við byggi-samtyktina.

Á fundi 2. juni 2010 tekur Mentanarnevndin undir við Teknisku Nevnd, 1. juni 2010.

Á fundi 9. juni 2010 tekur Fíggjarnevndin undir við Teknisku Nevnd, 1. juni 2010, og Mentanarnevndini, 2. juni 2010.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt.

83.
09/00593 Byggiloyvi til flótikøst – Bárður Østerø.

Bárður Østerø søkir um loyvi at byggja ein bygning til flótikøst og einari hædd omaná, sum skal nýtast til ungneyt og amboð.
Talan er um bygning, sum vendir oman og niðan, 16,5 m langur og 9 metrar breiður. Hæddin til mønu í ovara síðu er teknað til 4,7 m og endin omaneftir 8,9 metrar til mønu. Bygningurin er staðsettur á tekningini, mált 21 metrar har hann er nærmast við bakkatromina.

Staðbundna Nevndin fyri Trøllanes hevur viðgjørt umsóknina á fundi 10. mai 2010 og hevur hesar viðmerkingar til málið:
*fyriliggjandi ætlan leggur upp til bygging oman og niðan, sum er
*tann nærmasta byggingin í landinum í mun til eitt lundaland
ikki vakurt, tí veggirnir eru sera høgir í niðara enda
*ætlaða byggingin fer við útsýninum eystureftir, har flest myndir verða tiknar
*betri, um byggingin varð vend suður/norð framvið vegnum
*onnur líknandi bygging er á Trøllanesi, har jarðarmunurin er krógvaður við uppfylling, henda bygging er mitt í gomlu bygdini
*í dag verður gingið burtur frá, at neytini standa omaná køstinum – helst eittplans bygging
*kann verða vandamikið við køsti beint undir neytunum, tí gassframleiðsla er vanlig í flórum

Heilsu- og Umhvørvisnevndin hevur havt málið til kunning

Tekniska Nevnd tekur undir við staðbundnu nevndini, og at T.U. arbeiðir víðari við málinum.

Býráðsins samtykt: Jógvan Skorheim luttók ikki í viðgerðini av hesum máli, vegna ógegni.
Samtykt at heimila teknisku nevnd at avgreiða málið.

84.
10/00400 Umsókn um sundurbýti, matr. nr. 87a, Svínoy – Umhvørvisstovan.

Umhvørvisstovan biður um býráðsins ummæli til sundurbýti av matr. nr. 87a í Svínoy, soleiðis at sethúsaluturin verður matrikuleraður fyri seg. Tekniska Umsiting hevur ongar viðmerkingar til málið.

Á fundi 6. mai 2010 tekur Svínoyarnevndin undir við málinum, soleiðis sum hetta er lýst í skrivi frá Búnaðarstovuni til Matrikulstovuna, dagf. 2. mars 2010.

Á fundi 1. juni 2010 tekur Tekniska Nevnd undir við at geva umsókta loyvi.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt.

85.
09/00315 Bygging av ellis- og røktarheimi í miðbýnum.

Landsverk hevur boðað kommununi frá, at teir ikki kunnu átaka sær byggiharraleiklutin, sum býráðið áður hevur samtykt, at teir skulu hava. Tí verður mælt til, at geva býarverkfrøðinginum, sosialdeildarleiðaranum og roknskaparleiðaranum undir leiðslu borgarstjórans fíggjarligu ábyrgdina av verkætlanini, meðan projekteringin og byggibúningararbeiðið verður framt. Aftrat teimum er bygginevnd, har sosialdeildarleiðarin er formaður. Ætlanin er síðani at viðgera spurningin um møguligan annan byggiharra seinni, og innan sjálv byggingin av ellis- og røktarheiminum fer í gongd. Fuglark metir ikki, at búrúmsvíddin á 34 m^2 kann gerast innan fyri fíggjarkarmin, ið er 41 mió. kr. Um fíggjarkarmurin skal haldast, mugu búrúmini minkast niður á 30 m^2.

Á fundi 1. juni 2010 gav Elsebeth Gunnleygsdóttur, forkvinna í Sosialu Nevnd, Teknisku Nevnd eina frágreiðing um málið.

Á fundi 2. juni 2010 tekur Sosiala Nevnd undir við ætlanini um at gera búrúmini 34 m^2, sum verandi uppskot til byggiskrá leggur upp til.

Á fundi 9. juni 2010 í Fíggjarnevndini tekur ein minniluti, Steinbjørn O. Jacobsen og Eyðgunn Samuelsen, undir við Sosialu Nevnd, 2. juni 2010. Ein annar minniluti, Gunvá við Keldu og Jógvan Skorheim, tekur støðu í býráðnum.

Býráðsins samtykt: Tilmælið frá SoN samtykt við 10 atkvøðum fyri og 0 ímóti.

86.
10/00374 Endurskoðan av fíggjarætlanini fyri 2010.

Á býráðsfundinum 18. mai 2010 samtykti býráðið við fyrru samtykt eitt uppskot til endurskoðaða fíggjarætlan, dagfest 22. apríl 2010, har inntøkur og útreiðslur verða reguleraðar við samanlagt 5,32 mkr.

Heilsu- og Umhvørvisnevndin hevur á fundi 31. mai 2010 hav málið til kunning.

Ferðslunevndin hevur á fundi 1. juni 2010 tikið málið til eftirtektar.

Á fundi 1. juni 2010 í Havna- og Vinnunevndini tekur ein minniluti í nevndini, Atli S. Justinussen og Óli M. Lassen, undir við tillagingini. Ein annar minniluti, Hans A. Bertholdsen, tekur støðu í býráðnum.

Á fundi 1. juni 2010 í Teknisku Nevnd tekur ein meiriluti í nevndini, Óli M. Lassen, Jógvan Skorheim og Elsebeth Gunnleygsdóttur, undir við ætlanini. Ein minniluti, Óluva Klett-skarð og Hans A. Bertholdsen, tekur støðu í býráðnum.

Á fundi 2. juni 2010 í Mentanarnevndini tekur ein meiriluti í nevndini, Jógvan Skorheim, Elsebeth Gunnleygsdóttur og Atli S. Justinussen, undir við fyriliggjandi uppskoti. Ein minniluti, Jákup F. N. Mikkelsen, tekur ikki undir við fyriliggjandi uppskoti.

Á fundi 2. juni 2010 í Sosialu Nevnd tekur ein minniluti í nevndini, Elsebeth Gunnleygsdóttur og Atli S. Justinussen, undir við endurskoðanini av fíggjarætlanini 2010. Ein annar minniluti, Steinbjørn O. Jacobsen og Jákup F. N. Mikkelsen, tekur ikki undir við fyriliggjandi uppskoti.

Á fundi 9. juni 2010 beinir Fíggjarnevndin málið til býráðið. Ein minniluti í nevndini, Gunvá við Keldu og Jógvan Skorheim, tekur undir við býráðssamtyktini 18. mai 2010. Ein annar minni-luti, Steinbjørn O. Jacobsen og Eyðgunn Samuelsen, tekur undir við broytingaruppskoti minnilutans á býráðsfundinum 18. mai 2010.

Býráðsins samtykt: Broytingaruppskot frá býráðsmeirilutanum, dagfest 14. juni 2010, sum javnvigar við eini hækking av innt. og útr. upp á 2,32 mió. kr. varð samtykt við 6 atkvøðum fyri (GvK, J. Skorheim, ASJ, EMG, ÓML og AK) og 4 atkv. ímóti.

87.
10/00192 Drotningavitjanin 2010.

Margretha Drotning og Heindrikur prinsur við fylgi koma á vitjan í Klaksvík 30. juni 2010. Ein slík vitjan kostar kommununi pening til eitt nú upprudding, viðlíkahaldsarbeiði, døgurðar, gávur, vaktarfólk, flagging v.m. Eingin avseting er gjørd fyri hesa vitjan, tí kommunan var ikki vitandi um hana, tá fíggjarætlanarsmíðið var fyri. Sí skriv frá umsitingini, dagf. 25. mai 2010, har mælt verður til, at serlig konta verður stovnað til hesar útreiðslur.

Á fundi 2. juni 2010 tekur Mentanarnevndin undir við tilmælinum frá umsitingini, dagf. 25. mai 2010.

Á fundi 9. juni 2010 tekur Fíggjarnevndin undir við Mentanarnevndini, 2. juni 2010.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt.

88.
10/00475 Dagføring av fíggjarætlan 2010 – lendi til FK.

Á fundi 9. juni 2010 mælir Fíggjarnevndin til, at sølupeningurin, áljóðandi 2,7 mió. kr., verður játtaður til planering av økinum og aðrar útreiðslur í tí sambandi.

Sí notat frá roknskaparleiðaranum, dagfest 10. juni 2010.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt. Atli S. Justinussen luttók ikki í viðgerðini av hesum máli, vegna ógegni.

89.
09/00879 Innrætting av kjallaranum í Sambýlinum á Heygnum – *1. viðgerð.*

Víst verður til býráðssamtyktina 15. des. 2009 um manning av bygginevnd at seta í verk og standa fyri innrætting av kjallaranum undir Sambýlinum á Heygnum fyri eina upphædd á uml. 1,5 mió. kr., og eftirfylgjandi nevndarviðgerðir í vár, har kunnað er um málið og heimild givin at arbeiða víðari við tí. Formliga er talan um eina eykajáttan, sum í hesum føri verður goldin av einari uppsparing, og tí skal málið hava tvær viðgerðir umframt kunning til Landsstýrið. Mælt verður nevndum og býráðið til at taka undir við fremjingini av verkætlanini eftir hesum fíggjarliga leisti, at verkætlanin verður goldin av kommununi og fíggjað av uppsparingini, sum Vistar-heimsnevndin umsitur.

Á fundi 2. juni 2010 tekur Sosiala Nevnd undir við tilmælinum frá umsitingini, 28. mai 2010.

Á fundi 9. juni 2010 tekur Fíggjarnevndin undir við Sosialu Nevnd, 2. juni 2010.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt.

90.
09/00936 Keyp av teldutalvum til skúlan á Ziskatrød – *1. viðgerð.*

Sí notat frá roknskaparleiðaranum, dagfest 28. mai 2010, um útvegan av talvum og teldum fyri kr. 610.780,- uttan mvg, har lagt verður upp til, at nevnda útgerð verður leasað.
Av tí at talan verður um leiguútreiðslur, so skal upphæddin bókast yvir raksturin, sum ger tað neyðugt við flytingum millum kontur frá íløgum til rakstur, ið krevur tvær viðgerðir.

Á fundi 2. juni 2010 tekur Mentanarnevndin undir við tilmælinum, 28. mai 2010. Tó fær umsitingin heimild at samráðast um, at sjálv leasingavtalan verður galdandi pr. 1. jan. 2011.

Á fundi 9. juni tekur Fíggjarnevndin undir við Ment-anarnevndini, 2. juni 2010.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt.

91.
10/00121 Skipan av orkuráðgeving gjøgnum NPP-verkætlanina SMALLEST- *2. viðgerð.*

Málið varð samtykt av býráðnum fyrru ferð 18. mai 2010.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt, vísandi til notat frá umsitingini 15. juni 2010.

92.
09/00825 Ráðgeving og umsókn um útoyggjastuðul til dýping o.a. í Svínoy.

Sum avleiðing av, at M/S Ritan fer í sigling til Svínoyar og Fugloyar, er neyðugt við dýping og nýggjum skipsfestum v.m. í Svínoy, og hevur kommunan fingið stuðul játtaðan frá IMR til arbeiðið. Ráðgevi kommununnar, Landsverk, hevur kost-naðarmett ábøtur og dýping til kr. 492.200,-. Hetta er neyðugt arbeiði, fyri at Ritan kann røkja sigling til Svínoyar, til tey trý støðini, sum verða brúkt í dag – á Víkini, á Eiðinum og við Glógvansurð. Sí eisini skriv frá umsitingini 27. mai 2010.

Á fundi 1. juni 2010 tekur Havna- og Vinnunevndin undir við tilmælinum frá umsitingini, 27. mai 2010.

Á fundi 9. juni tekur Fíggjarnevndin undir við Havna- og Vinnunevndini, 1. juni 2010.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt.

93.
10/00482 Umsókn um bráfeingis uppíbygging til sethús – matr. nr. 56 í Árnafirði.

Talan eru um eykamál, sum TN samtykti at viðgera á fundinum tann 1. juni 2010, har søkt verður um loyvi til bráfeingis uppíbygging til sethúsini á matr. nr. 56 í Árnafirði, vegna serligar umstøður, sum nevndar eru í umsóknini.

Einasti møguleiki fyri uppíbygging til sethúsini er at byggja oman í móti sandinum, men tá kemur útbygningurin at standa upp at markinum til fjøruna, sum er útløgd sum fríøki. Byggisamtyktin fyri økið krevur 2,5 metra fjarstøðu til mark, og tí verður í umsóknini søkt um neyðugt frávik, frá byggi-samtyktini, so byggjast kann uppat markinum.

Loysnin er, at eigarin ognar sær uml. 2,5 fetrar av fjøruni, fyri at lúka byggisamtyktina, men tá slík loysn kann taka drúgva tíð, so er neyðugt við fráviki, um byggiloyvið skal útskrivast skjótt.

Eisini verður heitt á kommununa um at viðmæla, at eigarin av matr. nr. 56 ognar sær ein greira uppá 2,5 metrar av fjøruni, so byggingin seinni verður í lagi sambært byggisamtyktini.

Formlig hoyring av grannum er ikki farin fram, men grannarnir hava í skrivi boðað kommununi frá, at teir einki hava ímóti, at ognin verður víðkað 3 metrar oman ímóti fjørumarkinum

Tekniska Nevnd tekur á fundi 1. juni 2010 undir við, at eigarin fær loyvi til hesa uppíbygging og viðmælir, at eigarin keypir neyðugt lendi til hesa verkætlan.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt, og at staðbundna nevndin verður hoyrd.